# Hevur Gallup selt sítt trúvirði?

HELGI ABRAHAMSEN



Eg havi fyrr víst á, í eini blaðgrein, at politikarar hava í ávísum førum drigið embætisfólk og aðrar serfrøðingar inn í politiska kjakið, fyri harvið at geva teirra politiska boðskapi størri trúvirði. Men trupulleikin við hesum er, at trúvirði hjá serfrøðingunum sjálvum minkar líka nógv sum tað økist hjá politikarunum, tá slíkt verður gjørt. Nú sær út til, at hetta sama er við at henda við stovninum Gallup Føroyar.

Tjóðveldisflokkurin kunngjørdi í farnu viku eina veljarakanning, sum Gallup Føroyar hevur lagt navn til. Ikki kann sigast, at kanningin er góð fyri andstøðuna á tingi, tí hóast nógv orka er løgd í at seta samgonguflokkarnar í ringt ljós tey seinastu árini, so varðveitir samgongan í kanningini øll síni 21 umboð á tingi. Einasta broytingin í floksbýtinum er, at tann eini andstøðuflokkurin tekur ein tingmann frá einum øðrum andstøðuflokki.

Men av tí at tað er Tjóðveldisflokkurin, sum hevur latið kanningina gjørt, so er tað eisini hann sum sendir tíðindaskrivini út til fjølmiðlarnar um kanningina. Og har eydnast tað við væl valdum orðum, at gera úrslitið til ein stórsigur.

**Skáka sær undan at spyrja um samband/ loysing**

Tað sum undrar meg mest við hesi kanningini, eru aðrir spurningar sum fólk hava fingið settar.

Sum spurningarnir eru orðaðir, er einki at ivast í, at tað er Tjóðveldisflokkurin, og ikki Gallup, sum hevur ført pennin, og tað er eisini hann sum velur út, hvørji úrslit skulu almannakunngerast og hvørji skulu haldast duld. Tað undrar meg til dømis, at hóast kanningin er gjørd í sambandi við at 60 ár eru liðin síðani fólkaatkvøðuna, so fáa vit einki at vita um, hvat fólk siga um spurningin um samband/ loysing. Annaðhvørt eru tey ikki spurd, ella passa svarini ikki inn í tað, sum Tjóðveldisflokkurin ætlaði at brúka kanningina til.

Ístaðin fyri at fáa henda spurningin lýstan, verða aðrir torskildir spurningar, sum fólk ikki hava so sterka meining um, brúktir til at geva eina ábending um, at føroyingar helst vilja hava loysing. Ja Tjóðveldisflokkurin og Gallup fara so langt sum at pástanda, at 60% av veljarum Sambandsfloksins vilja hava loysing frá Danmark. Her burdi onkur klokka farið at ringt (í hvussu so er hjá Gallup). Og her er tað, at eg havi hug at spyrja, um Gallup hevur selt sítt trúvirði?

**Keypa pláss í fjølmiðlunum**

Størsta endamálið hjá Tjóðveldisflokkinum við at bíleggja kanningina, er uttan iva, at flokkurin við henni hevur roynt at tryggja sær nógv pláss í fjølmiðlunum dagarnar rundanum 14. september. Tann ætlanin sær út til at vera væl eydnað. Eg fari tí at spyrja útvarp, sjónvarp, og tíðindabløð, um aðrir flokkar eisini kunnu rokna við at fáa líka nógv pláss í tíðindunum, um teir gera eina slíka kanning. Um so er, so fara vit á skrivstovu Sambandsfloksins at biðja um at fáa eina "veljarakanning" gjørda stutt undan komandi løgtingsvali, og eg rokni við, at hinir flokkarnir eisini fara at gera tað sama.

# HÅ BÆH og KÅ Í !? Ella: HÁ BE og KÁ Í (KA Í)!

EYÐUN Á BORG



HB: Onkur segði mær, at HB-viðhaldsfólk rópa:"Kåmm så, HÅBÆH!" og ikki:"Koyr á, HÁBE"!?

Ikki man tað vera. Ikki nú á døgum.

KÍ: Kann tað bera til, at norðoyingar rópa KÅÍ á liðið har norðuri?

Um so er, so ruggar ikki rætt. Liðið eitur jú KÁÍ. Norðoyingar siga sjálvandi KAÍ á sínum norðoyamáli! Siga tey ikki KA í skúlunum har norðuri? (Papi malaði batin).

Annars áttu ávís fjølmiðlafólk og aðrir føroyingar at vitað, at H og K úttalast HÁ og KÁ á føroyskum, ikki HÅ og KÅ!

E.S.: Hitt havnarliðið eitur B seks og trítivu, tre er ikki føroyskt!?

Við bókstavakvøðu

Á Borg á Argjum um tampardag 2006

# Ger tína ávirkan galdandi, Tobbi!

SIGMAR BLÁBERG
tíðindamaður í útvarpinum

Fyri aðru ferð í summar leggur tú eftir mær í bløðunum, fyri at renna hundsørindi fyri ein ella annan, og hesaferð skal tað ikki standa ósvarað.

Lat meg gera tær greitt alt fyri eitt, at tað ongantíð verður tú, sum gert av, hvønn eg velji at endurgeva skrivliga, ella hvønn eg velji at tosa við, so viðkomandi sjálv/ur, kann siga tað sum sigast skal. Við øðrum orðum, tað verður ongantíð tú, sum setur dagsskránna í mínum yrki sum tíðindamaður.

Nei, eg havi ongan bippara sum nakar ávísur kann ringja ella rópa til.

Men eg haldi fast um, at tað sum samrøðna við Jørgin Niclasen snúði seg um, hevur alstóran týdning í orðaskiftinum um okkara fiskastovnar. Tí talvan sum hann sendi mær, vísir tíðuliga, hvussu gongdin í toskafiskiskapinum hevur verið. Og tað var tað sum eg metti at almenningurin átti at fáa at vita.

Tá tað ikki letur seg gera at almannakunngera eina talvu í útvarpinum, so má ein velja, annaðhvørt at endurgeva hana sjálvur, ella lata viðkomandi sum kennir talvuna, gera tað.

Tað helt eg at Jørgin Niclasen gjørdi so væl, og so skilligt fyri almenninginum, at eg bað hann gera tað.

Hann kom væl frá tí, og bert framtíðin fer at vísa, um hann hevur rætt ella ikki.

Innslagið var, sum tað skuldi vera.

Annars eru tað mánaðir síðani eg, sum tíðindamaður, seinast tosaði við Jørgin Niclasen

Eg kann leggja aftrat, at eg sjálvur fríggjakvøldið í farnu viku gjørdi samrøðu við ein fiskifrøðing um yvirlitstrolingarnar, sum gjørdar vórðu í august.

Tað sum í mínari verð er nógv meira áhugavert, eru tær umstøður sum arbeitt verður undir.

Havi fyrstu 3 kvøldini í vikuni verið einsamallur á innanlandsvakt til at gera tíðindir til kl. 18.30.

Tá standurin er soleiðis, so er ein altíð noyddur at gera eitt val. Ein kann velja at skriva nógvar stubbar, sum einki fylla, ella at gera nøkur innsløg, sum fylla nakað, tí í mínari verð er tað altíð lurtarin sum kemur í fremstu røð.

Bæði mánakvøldið og týskvøldið bar til at koma til innsløg, sum í samráð við tann ið tosað varð við, vórðu gjørd so stutt sum gjørligt, og fyri at sleppa undan at klippa ov nógv. Tí slíkt er als ikki tíð til í eini slíkari støðu. Tú hoyrdi kanska tíðindini mikukvøldið. Teimum var hvørki eg ella nakar annar stoltur av.

Tú hevur polittiska ávirkan. Og tú eigur at gera tína polittisku ávirkan galdandi, til frama fyri okkum sum starvast í útvarpinum, og til gagns fyri lurtaran.

# Uppískoyti til morgunsendingina í morgun

ODDVØR JOHANSEN



Evnið var føroysk framleiðsla. Einar Waag kom til at siga, at tíðin mundi vera farin frá, at fólk keyptu føroyskt av tjóðskaparligum grundum.

Eg eri ikki samd í hesum. Tíðin fer ongantíð frá at hugsa um framleiðsluna í eins egna landi. Ein so lítil kundaskari sum hin føroyski heimamarknaðurin verður noyddur at hugsa føroyskt, tá ið keypt verður, annars kunnu allar fyritøkur leggja seg at doyggja beinanvegin.

Um annars góðskan er í lagi, eiga vit at keypa alt, vit kunnu av tí, ið føroyingar tilvirka sjálvir, tað veri seg innan hondverk, prentlutir, list, fiskur, kjøt, klæðir, embalasju, drekkivørur og so framvegis.

Sárt er at síggja alt hetta útlendska dumpingsodavatni í handlunum, tilvirkað av trælum í onkrum fjarum landi. Og tað er nógv fyri at síggja Føroya løgting ganga á odda, tá ið umrøður at spenna bein fyri føroyskari framleiðslu.

Keypið føroyskt!

Tórshavn 15 sept. 06

# Eitt óvirkið Fiskimálaráð

FINNLEIF GUTTESEN



**Krevur eina dagløn fyri at útskriva tvey fiskiloyvir**

Tað er sjón fyri søgn, at Fiskimálaráðið er ómetaliga óvirkið, nú tey krevja 500 krónur fyri at útskriva eitt fiskiloyvi á éitt A 4 pápírsark og senda tað til báteigarar.

At tendra telduna, útprinta fiskiloyvi, leggja tað í ein brævbjálva, sleikja eitt frímerki, smekka tað á brævbjálvan og senda tað við postinum kann ikki kosta meir enn 25 krónur.

Við eitt sindur av viti og skili í Fiskimálaráðnum og Landsstýrinum, var frítt at fiska hjá bátum í bólki 5B og 5A, og so var ikki neyðugt at útskriva nakað fiskiloyvi til hesar bátar, tí veðrið og streymur avmarka fiskidagarnar heilt natúrliga.

Men tey umleið 700 fiskiloyvini, ið verða útskrivað um árið, kunnu nú fíggja lønirnar hjá 1,5 starvsfólkum, og er hetta helst ein byrjan til eitt avgjald fyri fiskirættindi, sum á hendan hátt blívur lirkað og lumpað ínn gjøgnum bakdyrnar.

